## Heilsudagur í Runavík

Áhugavert tiltak fyri starvsfólk skipað av røktarheiminum og hjartafelagnum á Røktar- og ellisheiminum í Runavík. 13. apríl kl. 10.00 verður skipað fyri áhugaverdum tiltaki fyri starvsfólk. Hesin dagur er ætlaður sum "heilsudagur" burturav. Skráin er fjølbroytt. Starvsfólkini fáa høvi til, at fáa gjørt ymiskar kanningar – mált blóðtrýst, blóðsukur, kolesterol og BMI. Tað er hjartafelagið, ið stendur fyri kanningunum. Fitnessreiðskapurin í fysioterapiini er til taks allan dagin og so er eisini ætlanin við fimleiki – bæði í samkomuhøllini og í venjingarhylinum. Gongutúrar framvið Toftavatn eru somuleiðis á skránni. Allan dagin borðreiðir køkurin við heilsugóðum mati. Dagurin endar kl. 15.00, tá Sølvi Reinert Hansen heldur fyrilestur undir heitinum: »Jaligur lívsstílur«. Meira upplýsingar á heimasíðuni: www.ere.fo



# Alt ov nógv fer av veiðivirðinum

**FISKIVINNA Teir, sum eiga Ågot í Klaksvík, tíma ikki longur at rinda stórar landingarútreiðslur. Nú fara teir at frysta fiskin umborð og landa veiðina sjálvir. Á næst seinasta túri seldu teir fyri 514.000 krónur, harav landingar-og søluútreiðslurnar vóru umleið 13% av veiðivirðinum**

### Fakta

**Ågot:** 2001
**Skipaslag:** Frystilínu-og garnaskip
**Smíðiár:** 1970
**Longd:** 32,31 m.
**Breidd:** 7,47 m.
**Eigari:** Sp/f Ågot, Klaksvík

Vilmund Jacobsen




**SLÓÐBRÓTARAR**

*– Vit eru fyrsta lið í okkara parti av vinnuni, og í slíkum føri eru tað skip og fiskimenn, sum mugu galda, tá tað gongur niður á bakka. Árið í fjør var vánaligt, og vit vilja gera okkara til fyri, at árið í ár skal vignast betri, sigur Eyðstein Poulsen, skipari og eigari av Ågot*

Mynd: Jens Kr. Vang

Línuskipið Ågot í Klaksvík leggur nú um til garnaveiði. Skipið hevur loyvi at veiða svartkalva við gørnum, og hetta loyvi hava teir eisini brúkt áður. Teir royndu við gørnum í fjør og løgdu um aftur til línu í november.

At Ågot nú leggur um til gørn, er tískil eingi kollveltandi tíðindi.

Tað nýggja í virkseminum hjá Ågot er, at teir nú fara at frysta fiskin umborð – og fara ikki landa veiðina sum ísfisk, soleiðis sum gjørt hevur verið øll árini, síðan skipið kom í føroyska fiskiskipaflotan í 2001.

Tá Ågot varð keyptur úr Noregi, hevði skipið lutfalsliga nýggja frystilast, sum ongantíð hevur verið brúkt øll hesi árini.

Tað, sum eisini er áhugavert, er, at Eyðstein Poulsen, skipari og eigari, slett ikki er nøgdur við allar tær útreiðslur, sum standast av landing og sølu.

Hann sigur, at á næst seinasta túri fyri páskir høvdu teir 132.000 pund av línufiski undan Føroyum.

– Vit seldu fyri tilsamans 514.163 krónur, men harav vóru landingar- og søluútreiðslur út við 70.000 krónur, sum eg haldi er ein alt ov stórur partur av søluvirðinum.

Meðan vit práta, hyggur Eyðstein Poulsen í skjølini og letur okkum vita, hvørjar faktuellu útreiðslurnar eru av eitt nú landing og støddarskiljing.

– Vit rinda út við 29.000 krónur bara fyri at fáa fiskin upp úr lastini og slakar 26.000 krónur fyri støddarskiljing. Aftrat hesum kemur byrjunargjald og síðan gjald fyri søluna av veiðini.

Eyðstein vísir á, at landing og søla av hesum 132.000 pundunum, sum góvu stívliga hálva miljón krónur í søluvirði, kostaði skipi og manning út við 70.000 krónur – ella góð 13% av samlaða søluvirðinum.

– Hetta haldi eg er alt og nógv, sigur skiparin og reiðarin, sum nú ikki tímir hetta meiri.

> **... vit hugsa longur enn til bara at heilfrysta veiðina umborð. Vit hugsa eisini um at skráskera, men til tess krevst, at landsstýrið gevur okkum loyvi...**
>
> EYÐSTEIN POULSEN

### Í egnar hendur

Eyðstein Poulsen ásannar, at nú tað treingir saman um ymsastaðni í vinnuni, er líkt til, at ymisku tættirnir líkasum royna at taka sum frægast til sín.

– Vit eru fyrsta lið í okkara parti av vinnuni, og í slíkum føri eru tað skip og fiskimenn, sum mugu galda. Árið í fjør var vánaligt, og vit vilja gera okkara til fyri, at árið í ár skal vignast betri. Tað nyttar so lítið, hvat vit fiska um prísir og tað, sum stendur eftir á botnlinjuni, ikki roynist, tá árið er úti.

Eyðstein Poulsen hevur tí gjørt av at ganga nýggjar leiðir við Ågot og sínum fólki.

– Vit leggja nú um til garnaveiði, hava startað frystaríið upp og fara at frysta umborð.

Hann sigur, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan skal koma við síni góðkenning, tá frystarí, sum ikki hevur verið í brúki so leingi, verður startað uppaftur til frysting av fiski.

– Higartil vísir alt seg at rigga, sum tað skal, og vit vóna, at góðkenningin kemur, so vit kunnu loysa seinni í hesi vikuni.

Eyðstein vísir á, at soleiðis sum føroysk ísfiskaveiða er vorðin við lítlari kapping um fiskin, snýr tíðin, skip og manning eru í sjónum, seg ofta líka nógv um, nær komast skal til landing, sum um at fáa fisk á feltinum.

– Hetta er vorðið rættiliga strævið. Tí hava vit nú valt at fara at frysta umborð, soleiðis at vit ikki eru so tengdir at landingar- og søluliðnum, sum vit eru í dag.

Hann sigur, at aftanfyri hugskotið at frysta umborð liggur eisini, at manningin sjálv skal landa veiðina, tá hon skal skipast upp.

– Vit hugsa longur enn til bara at heilfrysta veiðina. Vit hugsa eisini um at skráskera, men til tess krevst, at landsstýrið gevur okkum loyvi til tess. Vit hava søkt um hetta loyvi, men hava ikki fingið svar úr Fiskimálaráðnum.

Eyðstein vísir á, at teir hava loyvi at avhøvda svartkalva umborð, men ikki skráskera.

– Vit fara so at royna hetta, og vit vóna, at hetta kann vera viðvirkandi til, at vit fáa ein betri rakstur – bæði til skip og manning.

Skiparin heldur, at fleiri fyrimunir kunnu vera við at frysta veiðina umborð.

– Ein er, at tú ikki alla tíðina noyðist at hugsa um, nær farast skal inn at landa og fiskurin, sum liggur frystur, gerst heldur ikki gamal eftir nøkrum døgum. Eru prísútlitini vánalig, er ikki á sama hátt neyðugt at selja veiðina til tann fyrsta og besta. Í aðrar mátar skuldi eisini verið møguligt á ymiskan hátt at skipað seg betri umborð.

Eyðstein Poulsen sigur seg vera rættiliga spentan upp á hesa royndina, sum teir nú fara undir og sum skilst, eru tað fleiri við honum, sum bíða spentir eftir, hvussu hetta fer at rigga.

Ætlanin er, at Ågot loysir við eini 8 monnum umborð.

vilmund@sosialurin.fo